ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

27. februar 2017
Mál: 16/00830-10
Viðgjørt: Poula Lervig

**Løgtingsmál nr. 113/2016: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin)** (Privat samdøgursrøkt o.a.)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin)**
(Privat samdøgursrøkt o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 11, stk. 2 verður orðað soleiðis:
”*Stk. 2.* Harumframt tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð í málum viðvíkjandi rætti til ókeypis umboðan, sbr. § 57, stk. 3, í øllum málum viðvíkjandi umsorganaryvirtøku og samverurætti, sbr. §§ 19, 22, 23 og 24, í málum um familjuviðgerð og dagstovnatilboð á stovnum hjá landinum, sbr. § 15 a, fyriskipan eftir § 15 b, stk. 3 og í málum um privata samdøgursrøkt, sbr. § 63 a, stk. 5.”

**2.** § 15, stk. 1, nr. 7 verður orðað soleiðis:
“7) geva tilboð um umlættingarskipan hjá næstrafólki ella øðrum, ið hava tætt samband við barnið, og sum barnaverndartænastan metir eru egnaði sum umlættingarforeldur hjá ávísa barninum,”

**3.** Í § 15 verður sum stk. 4 sett:
“*Stk. 4.* Um tað ikki sambært stk. 1, nr. 7 ber til at finna næstrafólk ella onnur við tøttum sambandi við barnið, og sum eru egnaði til uppgávuna, verða góðkend fosturforeldur nýtt til endamálið sambært kapittul 5 í hesi lóg.”

**4.** Í § 22, stk. 4, verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur eftir tilmæli frá Barnaverndartænastuni støðu til, um umboðið fyri Barnaverndartænastuna skal virka sum
1) eftirlit við ella
2) stuðul hjá foreldrunum.”

**5.** Í § 27, stk. 5 verður aftaná 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Um mett verður, at næstrafólk ella onnur, ið hava tætt samband við barnið, eiga at veljast sum

fosturforeldur, ger Barnaverndartænastan eitt ítøkiligt tilmæli til Fosturforeldraskipanina at taka avgerð út frá.”

**6.** Aftan á § 63 verður sum kapittul 9 a sett:

“**Kapittul 9 a**
**Privat samdøgursrøkt**

**§ 63 a.** Ongin kann hava eitt barn undir 15 ár í samdøgursrøkt í privatari familjurøkt longur enn 3 samfeldar mánaðir uttan at hava fingið loyvi frá viðkomandi barnaverndartænastu í økinum, har røktarfamiljan býr.
*Stk. 2.* Neyðugt er ikki við loyvi sambært stk. 1 tá talan er um nær skyld ella aðrar næstringar, ið barnið hevur eitt tætt tilknýti til.
*Stk. 3.* Loyvi sambært stk. 1 verður bert givið, um ein kanning av røktarfamiljuni vísir, at uppihaldið er barninum at gagni. Tá loyvið verður givið, skal barnaverndartænastan gera foreldramyndugleikahavaran varugan við ásetingina í stk. 5.
*Stk. 4.* Tað er ábyrgdin hjá foreldramyndugleikahavara at tryggja sær, at røktarfamiljan hevur neyðuga loyvið.
*Stk. 5.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann, eftir áheitan frá røktarfamiljuni ella barninum, taka avgerð um, at barnið ikki skal flyta heim aftur frá privatari familjurøkt sambært stk. 1 og 2, um mett verður, at hetta kann skaða barnið.
*Stk. 6.* Ásetingarnar í stk. 1-5 eru ikki galdandi, tá bara annað av foreldrunum hevur foreldramyndugleika yvir barninum, og barnið býr hjá hinum foreldrinum.”

**7.** Í § 69, stk. 1, verður “§ 33, stk. 3” broytt til: “§ 35, stk. 2”.

**8.** Í § 69, stk. 2, verður ”Barnaverdaøkini” broytt til: ”Barnaverndarøkini.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Í áliti, dagfest 2. juni 2016, staðfestir Løgtingsins Umboðsmaður, við grundarlagi í m.a. grein 20 í Barnarættindasáttmálanum hjá ST, at tørvur er á ásetingum í barnaverndarlógini um privata samdøgursrøkt. Við slíkari áseting hevði verið møguligt hjá foreldramyndugleikahavara at gjørt privatrættarliga avtalu um samdøgursrøkt av barni sínum við góðkenning og eftirliti frá skikkaðum myndugleika. Somuleiðis hevði verið tryggjað, at onkur var, sum lógliga kundi taka umsorganarligar avgerðir vegna hesi børn, sum ikki búgva hjá foreldramyndugleikahavara, men sum heldur ikki eru umsorganaryvirtikin av myndugleikunum.

Eisini hevur skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini gjørt Almannamálaráðið varugt við, at neyðugt er at skilja millum samveru undir eftirliti og stuðlaðari samveru í § 22, stk. 4 um samveru í barnaverndarlógini, tá talan er um, at foreldur at børnum, ið eru umsorganaryvirtikin, hava samveru við hesi.

Afturat hesum koma ávísar aðrar tillagingar/broytingar, serliga í mun til at velja næstrafólk og onnur, sum hava tætt tilknýti til barnið, sum umlættingar- og fosturfamiljur. Talan er fyri tað mesta um nærri nágreining av galdandi lóggávu.

### 1.2. Galdandi lóggáva

*Privat samdøgursrøkt*

Áður galdandi barnaforsorgarlóg (lovbekendtgørelse nr. 104 af 2. mars 1988 om børneforsorg, ið fór úr gildi 1. januar 2006) hevði eina generella áseting um børn í familjurøkt v.m., ið ásetti, at “Ingen må modtage eller have noget barn under 14 år i familiepleje eller mod betaling i dagpleje uden dertil at have fået tilladelse af børneværnsudvalget. Plejetilladelse gives skriftligt for hvert enkelt barn”. Talan var um eina generella áseting, ið fevndi bæði um tað, sum vit í dag kenna sum fosturforeldur, ið hava børn til fosturs ella umlætting, tá avvarðandi myndugleikar hava tikið avgerð um, at neyðugt er, at barnið býr uttan fyri heimið í eitt styttri ella longri tíðarskeið orsakað av vanda fyri heilsu og menning barnsins, og eisini um tey føri, tá foreldur lótu onnur taka sær av barninum í eitt styttri ella longri tíðarskeið, uttan tó, at talan var um eitt mál av slagi fyri barnaverndarmyndugleikarnar. Í báðum førum var neyðugt við loyvi frá avvarðandi myndugleikum, um onnur enn foreldrini skuldu hava barnið búgvandi.

Galdandi barnaverndarlóg, løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desembur 2013, ið avloysti omanfyri nevndu barnaforsorgarlóg, hevur onga áseting um privata samdøgursrøkt. Lógin hevur ásetingar um fosturheim, og ásetur, nær børn kunnu setast til fosturs, men felags fyri tey børn, ið verða sett til fosturs sambært barnaverndarlógini er, at barnaverndarmyndugleikarnir meta, at við atliti til barnsins heilsu og menning er neyðugt at barnið býr uttan fyri heimið í styttri ella longri tíð, t.d. í umlætting ella tá barnið er umsorganaryvirtikið. Lógin hevur sostatt onga áseting um, at neyðugt er við loyvi ella góðkenning frá myndugleikum, tá børn búgva uttan fyri heimið, men ikki eru umsorganaryvirtikin av myndugleikunum, eins og Løgtingsins Umboðsmaður vísir á.

*At skilja millum samveru undir eftirliti og stuðlaðari samveru*

Galdandi áseting um samveru í § 22, stk. 4 í barnaverndarlógini sigur, at “tá ið tað er neyðugt fyri heilsu og menning hjá barninum, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin seta treyt um, at umboð fyri barnaverndartænastuna skal vera hjástatt undir samveru ímillum barn og foreldur”. Royndirnar vísa, at tað er ymiskt, hvør leikluturin og tørvurin hjá barnaverndartænastuni er, alt

eftir, hvussu viðurskiftini eru millum barn og foreldur og hvussu støðan er hjá foreldrunum annars. Í summum førum er talan um, at vandi er fyri, at foreldrini skaða barnið undir samveru, antin likamliga ella á annan hátt. Í hesum førum er neyðugt, at barnaverndartænastan hevur leiklutin sum eftirlit, ið skal tryggja, at barnið ikki tekur skaða undir samveruni. Í øðrum førum er talan um, at foreldrini, t.d. vegna manglandi foreldraførleika, ikki megna at hava samveru við barnið, og í slíkum førum er uppgávan hjá barnaverndartænastuni meira at hjálpa og stuðla foreldrunum í samveruni við barnið.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

*Privat samdøgursrøkt*

Endamálið við hesum partinum av uppskotinum er at tryggja, at ongin hevur børn búgvandi í eitt tíðarskeið longri enn 3 samfeldar mánaðir uttan so, at skikkaðir myndugleikar hava givið loyvi, eins og at trygd fæst fyri, at onkur er, sum lógliga kann taka umsorganarligar avgerðir vegna hesi børn, sum ikki búgva hjá foreldramyndugleikahavara, men sum heldur ikki eru umsorganaryvirtikin av myndugleikunum. Tó verður undantak gjørt, tá talan er um nær skyld ella aðrar næstringar, ið barnið hevur tætt tilknýti til, sí nærri í serligu viðmerkingunum.

*Samvera undir eftirliti og stuðlað samvera*

Endamálið við hesum partinum av uppskotinum er at tryggja, at samveran millum foreldur og børn, tá barnið er umsorganaryvirtikið, er til gagns fyri báðar partar soleiðis, at barnið ikki tekur skaða av samveruni eins og at foreldrini verða hjálpt og stuðlaði í teirra leikluti sum foreldur, so endamálið við samveruni verður rokkið á bestan hátt.

*Aðrar broytingar*

Endamálið við øðrum broytingum í lógini er m.a. at gera skipanina við at velja næstrafólk og onnur sum umlættingar- og fosturfamiljur so smidliga sum gjørligt, herundir at áseta eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum myndugleikarnar.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

*Privat samdøgursrøkt*

Við uppskotinum verður mælt til at gera nýtt kapittul í barnaverndarlógina um privata samdøgursrøkt, ið ásetur treytirnar fyri, nær neyðugt er við sonevndum røktarloyvi fyri at hava børn búgvandi.

*Samvera undir eftirliti og stuðlað samvera*

Við uppskotinum verður mælt til at broyta § 22, stk. 4 soleiðis, at lagt verður afturat, at Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur støðu til, um umboðið frá barnaverndartænastuni skal virka sum eftirlit ella sum stuðul hjá foreldrunum.

*Aðrar broytingar*

Við uppskotinum verða viðurskiftini í sambandi við, at næstringar og onnur eru umlættingar- og fosturfamilja, lagaði neyvari til soleiðis, at greitt uppbýti er millum uppgávurnar og ábyrgdina hjá ávikavist barnaverndartænastu og Fosturforeldraskipanini.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjøl

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Barnaverndarstovu Føroya, Høvuðsbarnaverndarnevndini, Føroya Kommunufelag, Føroya Kærustovni, Fosturforeldrafelagnum, Sosialráðgevafelag Føroya, Ríkisumboðnum og Almannaverkinum.

Ummæli er komið frá Barnaverndarstovu Føroya/Kommunufelagnum, Føroya Kærustovni, Fosturforeldrafelagnum, Sosialráðgevarafelag Føroya og Almannaverkinum.

Almannaverkið hevur boðað frá, at tey ongar viðmerkingar hava til uppskotið.

Føroya Kærustovnur og Fosturforeldrafelagið meta, at tað hevði verið greiðari, um ætlaða broytingin um samveru verður skrivað soleiðis, at tað lætt kann tilskilast í avgerðum frá Høvuðsbarnaverndarnevndini, um samvera skal vera undir eftirliti og/ella um samveran skal verða stuðlað. Hetta kundi eitt nú verið gjørt við at seta møguleikarnar inn í hvør sítt stk. ella nr. Lógaruppskotið er tillagað samsvarandi hesari viðmerking.

Fosturforeldrafelagið metir, at serkunnleikin at góðkenna fosturfamiljur liggur hjá Fosturforeldraskipanini, og tí metir felagið ikki, at uppgávan at góðkenna næstrafólk sum umlættingarfamilja eigur at liggja hjá barnaverndartænastuni. Til hetta er at viðmerkja, at tá talan er um umlætting sambært § 15 í lógini, so er talan um umlætting í styttri tíðarskeið, t.d. vikuskiftisumlætting og upp til 2-3 vikurs umlætting í senn. Oftast er talan um, at tað eru næstrafólk ella onnur, ið hava tætt samband við barnið, ið eru umlættingarfamilja sambært ásetingini. Sæð í mun til endamálið við slíkari umlætting verður mett, at mannagongdin at góðkenna fosturforeldur gjøgnum Fosturforeldraskipanina er óneyðuga tung í hesum førum og stendur ikki mát við fyriskipanina, ið ikki er serliga inntrívandi í mun til barnið og foreldrini. Barnaverndartænastan er næst at kenna familju og onnur, ið hava tætt samband við barnið, og ger tí longu alt fyrireikandi arbeiðið at meta um hesi sum umlættingarfamiljur, so talan er ikki um stórvegis broyting. Verður talan seinni um umsorganaryvirtøku, so er tað altíð Fosturforeldraskipanin, ið góðkennir fosturforeldrini, eftir tilmæli frá barnaverndartænastuni.

Fosturforeldrafelagið nevnir, at hugtakið "røktarfamilja" tykist at verða eitt nýtt hugtak, ið helst er enn ein umseting frá danska "plejefamilje". Plejefamilje er frammanundan umsett til fosturforeldur. Hetta kann tí skapa ørkymlan. Mælt verður til, at funnið verður annað betri hóskandi orð ella heilt strikan av hesum orðið, tí fosturfamilja dekkar. Til hetta er at viðmerkja, at endamálið við at velja heitið "røktarfamilja" nettupp er at gera skilnað millum hesar familjur og fosturfamiljur. Fosturfamiljur eru familjur hjá børnum, ið eru umsorganaryvirtikin ella sum eru í umlætting sambært barnaverndarlógini, og felags fyri hesi børn er, at myndugleikarnir hava mett, at tey liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning. Tá talan er um røktarfamiljur sambært uppskotinum er talan um at formalisera viðurskiftini í sambandi við møguleikan hjá foreldrum at gera eina privatrættarliga avtalu við aðra familju um at hava barnið búgvandi. Talan er sostatt ikki um, at børnini liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, og tí verður mett, at neyðugt er við skilnaði millum hugtøkini fosturfamilja og røktarfamilja.

Fosturforeldrafelagið metir ikki, at rættartrygdin hjá biologisku foreldrunum er vard í sambandi við ætlaðu ásetingina í § 63a, stk. 5. Til hetta er at viðmerkja, at við tað at tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið hevur heimild at taka avgerð um, at eitt barn, ið er í privatari samdøgursrøkt, ikki kann flyta heimaftur, so er hædd tikin fyri rættartrygdini hjá bæði biologisku foreldrunum og barninum.

Føroya Kærustovnur vísir á, at sambært § 44 í barnaverndarlógini skulu børn, ið eru fylt 12 ár, altíð verða hoyrd, áðrenn avgerð verður tikin, og børn, ið eru 15 ár eru partar í málinum, við teim rættindum, sum har til hoyra. Kærustovnurin metir tí, at hildið eigur at verða fast við tey 12 ella 15 árini í ætlaðu lógarbroytingini um privata samdøgursrøkt heldur enn 14 ár. Ætlaða lógarbroytingin hevur sín uppruna í gomlu barnaforsorgarlógini og tilsvarandi áseting í donsku

servicelógini, ið báðar hava 14 ár sum mark fyri, nær neyðugt er við sonevndum røktarloyvi at hava børn búgvandi í privatari samdøgursrøkt. Tað verður tó ongantíð nágreinað hví júst hesin aldurin er valdur, og sæð í mun til, at barnaverndarlógin tilskilar børnum, ið eru fylt 15 ár serlig rættindi, serliga at hesi sambært § 44, stk. 4 eru partur í málinum við teimum rættindum, sum har til hoyra, eins og at onnur lóggáva eisini nýtir 15 ár sum skeringspunkt, verður mett rættast at broyta aldurin frá 14 til 15, og er uppskotið tillagaða samsvarandi hesum.

Sosialráðgevarafelag Føroya metir, at fordeilingin og ábyrgdin av uppgávum millum myndugleikar viðvíkjandi umlætting, umsorganaryvirtøku og privatari samdøgursrøkt tykist ógreið og fløkjaslig. Til hetta er at viðmerkja, at tað altíð er barnaverndartænastan, ið ger fyrireikandi arbeiðið, tá talan er um umlætting og umsorganaryvirtøku, bæði viðvíkjandi næstringum og øðrum fosturfamiljum, sum so aðrir myndugleikar taka avgerð við støði í. Tá talan er um privata samdøgursrøkt er tað uppgávan hjá barnaverndartænastuni at geva røktarloyvi í teimum førum, tá hetta krevst.

Sosialráðgevarafelag Føroya metir, at neyðugt er við eini nærri útgreinan av, hvør er at rokna sum næstringur hjá einum barni í mun til privata samdøgursrøkt, tí royndir vísa, at myndugleikar tulka næstringahugtakið ymiskt. Til hetta er at viðmerkja, at næstringahugtakið í hesum føri verður tulkað á sama hátt sum næstringahugtakið annars í barnaverndarlógini, t.v.s. at talan er um persónar, ið barnið er í familju við. Í viðmerkingunum eru ommur og abbar nevnd sum næstringar, men talan kann eisini verða um aðrar næstringar, t.d. systkin hjá foreldrum og onnur longur burtur í ættini.

Sosialráðgevarafelag Føroya og Kommunufelagið vísa á, at nóg stórt atlit ikki er tikið til rættartrygdina hjá barninum í mun til privata samdøgursrøkt, herundir hvør tryggjar, at barnið verður hoyrt, hvør arbeiðir við at varðveita sambandið millum barn og biologisk foreldur o.a. Til hetta er at viðmerkja, at talan er um eina regulering av møguleikanum hjá biologiskum foreldrum at gera eina privatrættarliga avtalu um at onnur hava børnini búgvandi í styttri ella longri tíðarskeið, uttan at talan er um, at børnini liva undir viðurskiftum, ið skaða teirra heilsu og menning. Talan er sostatt ikki um sonevnd “barnaverndarmál”, t.v.s at tað er onki at finnast at í mun til umsorgan og foreldraførleika hjá foreldrunum. Í hesum førum ber ikki til at nokta foreldrum at gera avtalu við onnur um at hava børnini búgvandi. Mett verður tó, at neyðugt er við ávísum reglum á økinum, serliga við atliti at rættartrygdini hjá barninum. Tí verður í lógaruppskotinum í ávísum førum kravt, at tey, ið hava børn búgvandi eftir hesi skipan, hava røktarloyvi.

Kommunufelagið skjýtur upp eina broyting í § 15, stk. 1, nr. 7 um umlætting, sum samsvarar serligu viðmerkingunum til broytingina, og er lógaruppskotið tillagað samsvarandi hoyringssvarinum.

Kommunufelagið metir ikki, at ætlaðu ásetingarnar um privata samdøgursrøkt yvirhøvur hoyra heima í barnaverndarlógini. Heldur eiga reglur um hesi viðurskifti at verða ásettar í lóg um foreldramyndugleika. Til hetta er at viðmerkja, at uppskotið um privata samdøgursrøkt hevur sína fyrimynd í áður galdandi barnaforsorgarlóg og ásetingunum í kapittli 13 í donsku servicelógini um “privat døgnpleje”. Tað er sostatt siðvenja at hava ásetingar um privata samdøgursrøkt í lóggávu, ið viðvíkur barnaverndarøkinum, heldur enn í aðrari lóggávu. Týðandi myndugleikarnir á økinum, barnaverndartænastan og Høvuðsbarnaverndarnevndin, eru longu nágreinaðir í barnaverndarlógini, og samanumtikið verður mett, at ásetingarnar hóska væl sum partur av barnaverndarlógini, tó í einum kapitli fyri seg eins og gjørt verður í donsku servicelógini. Afturat hesum kemur, at upprunin til hesa lógarbroyting um privata

samdøgursrøkt er álit frá Løgtingsins Umboðsmanni, ið greitt viðmerkir, at tað er eitt lýti við júst barnaverndarlógini, at hesar ásetingar mangla.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Hóast uppskotið hevur við sær ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur, sí niðanfyri undir pkt. 2.2., so verður ikki mett, at broytingin kemur at ávirka arbeiðsorkuna so mikið, og at hetta tí ikki eigur at hava stórvegis týdning av fíggjarligum slag fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri landið við tað, at Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um at nokta einum barni í privatari familjurøkt at flyta heimaftur.

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar við tað, at uppgávan at geva røktarloyvi til røktarfamiljur verður løgd til barnaverndartænasturnar eins og at leikluturin hjá barnaverndartænastunum í sambandi við samveru verður nærri nágreinaður. Eisini verður í lógini nærri nágreinað, hvørjar uppgávurnar hjá barnaverndartænastuni eru í sambandi við at velja næstrafólk og onnur, ið hava tætt samband við barnið, sum umlættingar- og fosturfamiljur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur við sær positivar sosialar avleiðingar fyri tey børn, ið búgva í privatari samdøgursrøkt, við tað at uppskotið krevur, at røktarfamiljan skal verða mett egnað at hava barnið búgvandi og harvið tekur uppskotið atlit til rættartrygdina hjá hesum børnum.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Grein 20 í Barnarættindasáttmálanum hjá ST frá 20. november 1989 ásetur, at

> "1. Eitt barn, sum fyribils ella støðugt ikki fær verið heima saman við næstringum sínum ella av tí, at tað er best fyri barnið sjálvt, ikki fær loyvi at verða verandi heima, hevur rætt til serliga vernd og stuðul frá landsins myndugleikum.

2. Luttakaralondini skulu í samsvari við tjóðarrætt sín tryggja slíkum barni aðra umsorgarn."

Mett verður, at ásetingin í uppskotinum um privata samdøgursrøkt er í samsvari við omanfyri nevndu áseting í Barnarættindamáttmálanum og harvið, saman við øðrum ásetingum í barnaverndarlógini, í stóran mun hevur tryggjað børnum rætt til serliga vernd og stuðul, tá hesi ikki kunnu búgva heima.

**2.9. Marknaforðingar**
Ongar kendar marknaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur barnaverndartænastunum at innheinta upplýsingar av ymsum slag frá familjum, ið søkja um røktarloyvi, herundir um fíggjarstøðu, heilsustøðu og samlívsstøðu. Tey, ið søkja um røktarloyvi, verða ikki beinleiðis áløgd skyldu at svara um hesi viðurskifti, men røktarloyvi kann bert verða givið, um upplýsingar av hesum slag verða fingnar til vega. Hetta fyri at tryggja, at uppihaldið hjá barninum í røktarfamiljuni er til gagns fyri einstaka barnið.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur heimildir til kommunurnar við tað, at barnaverndartænasturnar fáa heimild at innheinta upplýsingar frá familjum, ið søkja um røktarloyvi, eins og at barnaverndartænasturnar taka avgerð um, hvørt røktarloyvi skal gevast. Eisini áleggur lógaruppskotið heimildir til barnaverndartænasturnar at góðkenna næstrafólk og onnur sum umlættingarforeldur uttanum Fosturforeldraskipanina.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgognd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1, nr. 1**
Í § 11, stk. 1 og 2 í barnaverndarlógini verða nevndar tær ásetingar, ið heimila Høvuðsbarnaverndarnevndini at taka avgerðir. Sambært § 63 a, stk. 5 í lógaruppskotinum fær Høvuðsbarnaverndarnevndin afturat hesum heimild at taka avgerð um at nokta einum barni at flyta heim aftur úr privatari samdøgursrøkt, um hetta kann skaða barnið. Henda áseting eigur tí eisini at verða nevnd í § 11, stk. 2.

**Til § 1, nr. 2**
Sambært galdandi § 15, stk. 1, nr. 7 í barnaverndarlógini kunnu barnaverndartænasturnar geva tilboð um umlættingarskipan hjá góðkendum fosturforeldrum. Fyriskipanin er ein av fleiri fyriskipanum, nevndar í § 15, stk. 1, ið barnaverndartænasturnar skulu gera nýtslu av í teimum førum, tá ein kanning sambært § 45 í lógini vísir, at neyðugt er at seta ávís tiltøk í verk fyri barnið.

Endamálið við fyriskipanini er at veita foreldrunum umlætting í styttri tíðarskeið, soleiðis at tey kunnu fáa nýggja orku at taka sær av barninum. Tíðarskeiðið kann vara í 1 til 2 dagar í senn, til dømis vikuskiftisumlætting, og upp til 2-3 vikurs umlætting í senn, til dømis frítíðarumlætting. Talan er sostatt um umlætting í styttri tíðarskeið í senn, meðan barnið hevur sín gerandisdag og fasta bústað hjá foreldrunum.

Sambært orðaljóðinum í galdandi áseting eru tað bert “góðkend fosturforeldur”, ið kunnu hava børn í umlætting. Við “góðkend fosturforeldur” er at skilja fosturforeldur, ið eru góðkend av Fosturforeldraskipanini. Tað er sera vanligt, at tey, ið verða vald at hava børn í umlætting sambært hesi áseting, eru næstrafólk ella onnur, ið hava tætt samband við barnið. Av tí at talan er um umlætting í styttri tíðarskeið hevur Barnaverndarstovan, ið umsitur Fosturforeldraskipanina, mælt til, at í teimum førum, tá næstrafólk ella onnur, ið hava tætt samband við barnið, verða vald sum umlættingarfamilja, so er ikki neyðugt, at hesi eisini skulu góðkennast sum fosturforeldur av Fosturforeldraskipanini. Henda mannagongdin er óneyðuga tung og stendur ikki mát við fyriskipanina, ið ikki er serliga inntrívandi í mun til barnið og foreldrini.

Sambært lógaruppskotinum verður tí mælt til at broyta § 15, stk. 1, nr. 7 soleiðis, at funnið verður fyrst fram til, um næstrafólk ella onnur eru, ið hava tætt samband við barnið, og sum kunnu virka sum umlættingarforeldur. Um barnaverndartænastan metir, at hesi lúka fortreytirnar at verða umlættingarforeldur í mun til einstaka barnið, so er ikki neyðugt við aðrari góðkenning. Hesi skulu sostatt ikki góðkennast av Fosturforeldraskipanini.

Næstrafólk ella onnur, ið hava tætt samband við barnið sambært uppskotinum fáa samsýning eins og góðkend fosturforeldur sambært § 29 í barnaverndarlógini.

**Til § 1, nr. 3**
Sum ein avleiðing av omanfyrinevndu broyting í § 15, stk. 1, nr. 7, verður í § 15, stk. 4 ásett, at um tað ikki ber til at finna næstrafólk ella onnur við tøttum sambandi við barnið, og sum eru egnaði til uppgávuna, so verða góðkend fosturforeldur nýtt til endamálið. Hetta merkir, at næstrafólk ella onnur, sum hava tætt samband við barnið, skulu veljast framum onnur góðkend fosturforeldur, um hesi verða mett egnaði sum umlættingarforeldur, og er hetta eisini í tráð við ásetingina í § 27, stk 5 í lógini, sum ítøkiliga nevnir, at tá fosturforeldur skulu góðkennast, skulu fyrilit takast fyri næstrafólkum ella øðrum, ið hava tætt samband við barnið. Frameftir verður sostatt bert neyðugt við góðkendum fosturforeldrum, t.v.s fosturforeldrum góðkendum av Fosturforeldraskipanini, sum umlættingarforeldrum í teimum førum, tá ongir næstringar ella onnur eru, ið kunnu góðkennast sum umlættingarfamilja av barnaverndartænastuni í einstaka førinum.

**Til § 1, nr. 4**
Skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini hevur gjørt Almannamálaráðið varugt við, at neyðugt er at skilja millum samveru undir eftirliti og stuðlaðari samveru í § 22, stk. 4 um samveru í barnaverndarlógini, tá talan er um, at foreldur at børnum, ið eru umsorganaryvirtikin, hava samveru við hesi.

Galdandi áseting í § 22, stk. 4 sigur, at “tá ið tað er neyðugt fyri heilsu og menning hjá barninum, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin seta treyt um, at umboð fyri barnaverndartænastuna skal vera hjástatt undir samveru ímillum barn og foreldur”. Royndirnar vísa, at tað er ymiskt, hvør leikluturin og tørvurin hjá umboðnum fyri barnaverndartænastuna er, alt eftir, hvussu viðurskiftini eru millum barn og foreldur og hvussu støðan annars er hjá foreldrunum. Í summum førum er talan t.d. um, at vandi er fyri, at foreldrini skaða barnið undir samveru, antin likamliga ella á annan hátt. Í hesum førum er neyðugt, at umboðið fyri barnaverndartænastuna hevur leiklutin sum eftirlit, ið skal tryggja, at barnið ikki tekur skaða undir samveruni. Í øðrum førum kann talan vera um, at foreldrini, t.d. vegna manglandi foreldraførleika, ikki megna ella duga at hava samveru við barnið, og í slíkum førum er uppgávan hjá umboðnum fyri barnaverndartænastuna meira at hjálpa og stuðla foreldrunum í

samveruni við barnið. Møguleiki er sjálvandi eisini fyri, at umboðið virkar sum bæði eftirlit og stuðul. Orðaðljóðið í lógarbroytingini sigur, at umboðið virkar sum eftirlit ella stuðul hjá foreldrunum, men hetta forðar ikki fyri, at umboðið bæði virkar sum eftirlit og stuðul í einum og sama máli.

Mælt verður til, at nýggja ásetingin verður sett upp soleiðis, at samvera undir eftirliti og stuðlað samvera verða ásett í ávikavist nr. 1) og nr. 2). Hetta fyri at tað lætt kann tilskilast í avgerðum frá Høvuðsbarnaverndarnevndini, um samvera skal verða undir eftirliti og/ella um samveran skal verða stuðlað.

Avgerðin hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini um, hvørt samveran skal verða undir eftirliti ella sum stuðlað samvera byggir í hvørjum einstøkum føri á tilmæli frá barnaverndartænastuni í málinum, og er hetta í samsvari við galdandi siðvenju.

Broytingin kemur at merkja, at í teimum førum, tá Høvuðsbarnaverndarnevndin metir, at neyðugt er, at umboð fyri barnaverndatænastuna er hjástatt undir samveru, so kann Høvuðsbarnaverndarnevndin eisini nágreina, hvør leikluturin hjá umboðnum fyri barnaverndartænastuna skal verða, soleiðis at endamálið við samveruni millum barn og foreldur verður rokkið á bestan hátt.

**Til § 1, nr. 5**
Sambært galdandi § 27, stk. 5 skulu, tá fosturforeldur skulu veljast, fyrilit takast fyri næstrafólkum og øðrum, ið hava tætt samband við barnið. Hetta merkir, at tá avgerð er tikin um, at eitt barn skal setast til fosturs, so skal fyrst hyggjast eftir, um næstrafólk ella onnur, ið barnið hevur eitt tætt tilknýti til, eru til staðar, ið eru egnaði sum fosturforeldur, áðrenn heitt verður á Fosturforeldraskipanina um at velja út eina av fosturfamiljunum í teirra skipan. Næstrafólk ella onnur, ið hava tætt samband við barnið, verða góðkend sum ítøkiliga egnað í mun til tað ávísa barnið.

Eftir galdandi reglum er tað Fosturforeldraskipanin, ið góðkennir øll fosturforeldur, bæði tey, ið eru í skipanini, og tey, ið verða góðkend sum ítøkiliga egnað í mun til tað ávísa barnið. Í praksis er mannagongdin í sambandi við góðkenning av næstrinum og øðrum tann, at viðkomandi barnaverndartænasta, ið kennir barnið og familjuna, ger fyrireikandi arbeiðið og finnur fram til, um næstringar ella onnur eru, ið eru ítøkiliga egnaði sum fosturforeldur til einstaka barnið. Síðani ger barnaverndartænastan tilmæli til Fosturforeldraskipanina at taka avgerð út frá.

Fyri at sleppa undan, at talan verður um dupult-arbeiði hjá barnaverndartænastu og Fosturforeldraskipan og soleiðis, at tað í lógini verður greitt skilmarkað, hvør ið hevur ábyrgdina av at lýsa málið til fulnar, herundir at meta um, hvørt næstringar ella onnur eru egnaði sum fosturforeldur, verður ásett í § 27, stk. 5, at tað er barnaverndartænastan, sum ger eitt ítøkiligt tilmæli til Fosturforeldraskipanina at taka avgerð út frá.

Tilmælið frá barnaverndartænastuni skal verða ítøkiligt í mun til tað ávísa barnið, og skal innihalda upplýsingar um m.a.:
- hvørjir møguleikar eru troyttir í mun til at finna næstrafólk ella onnur, ið hava tætt samband við barnið
- eina neyva lýsing av tørvinum hjá barninum og um fosturforeldrini kunnu nøkta henda tørv

- fosturforeldrini hava neyðug umsorganarevni og foreldraførleika og møguligar royndir sum góðir uppalarar
- hvørt neyðugt er við stuðlandi fyriskipanum í fosturheiminum

**Til § 1, nr. 6**
Galdandi barnaverndarlóg hevur onga áseting um privata samdøgursrøkt, og hevur Løgtingsins Umboðsmaður í áliti frá 2. juni 2016 staðfest, at tað er eitt lýti við lógini, at slík áseting manglar.

Sambært uppskotinum verður talan um at gera eitt nýtt kapittul í barnaverndarlógini um privata samdøgursrøkt, ið ásetur, nær neyðugt er við sonevndum røktarloyvi fyri at hava børn búgvandi.

*Alment um privata familjurøkt*
Hugtakið privat familjurøkt sambært uppskotinum merkir, at eitt barn býr hjá øðrum enn foreldrunum, uttan at avvarðandi barnaverndartænasta hevur verið við í tilgongdini at fyriskipa uppihaldið, t.v.s uttan at talan er um umsorganaryvirtøku av barninum ella umlætting sambært barnaverndarlógini.

Talan er sostatt ikki um, at barnið verður sett heiman (anbringelse). At seta barn heiman krevur eina ítøkiliga avgerð, ið er grundað á eina kanning sambært § 45 í barnaverndarlógini, ið aftur er grundað á ein ótta fyri heilsuni og menningini hjá barninum.

Tá talan er um privata familjurøkt hevur foreldramyndugleikahavarin av einihvørji orsøk gjørt privatrættarliga avtalu við eina aðra familju um at hava barnið búgvandi í eitt styttri ella longri tíðarskeið, ið varðar longur enn 3 samfeldar mánaðir.

Skilt verður ímillum hugtøkini røktarfamilja og fosturfamilja. Eitt fosturheim (og fosturfamilja) er sambært barnaverndarlógini at skilja, tá eitt barn verður sett heiman í eitt annað heim, har fosturforeldur hava umsorgan fyri tí í styttri ella longri tíðarskeið. Talan kann m.a. vera um umlætting, bráðfeingis fosturheim og fosturheim, har børn verða sett fyribils ella varandi til fosturs. Felags fyri hesar fyriskipanir er, at foreldrini hjá barninum av persónligum ávum ikki megna at ansa barninum. Við røktarfamilju sambært uppskotinum er at skilja, tá foreldur av øðrum orsøkum enn t.d. orku og foreldraførleika ikki kunnu hava barnið búgvandi í eitt styttri ella longri tíðarskeið. Sum dømi um, nær talan kann verða um privata familjurøkt, kunnu nevnast, at foreldramyndugleikahavarin skal á sjúkrahús uttanlands ella skal arbeiða ella er burtur í lestrarørindum uttanlands eitt ávíst tíðarskeið.

Foreldramyndugleikahavarin velur sjálvur røktarfamiljuna, og hesar familjur eru sostatt ikki partur av skránni yvir fosturforeldur hjá Fosturforeldraskipanini.

Umráðandi er at hava fyri eyga, at talan ikki er um ættleiðing. Foreldramyndugleikahavarin hevur framvegis foreldramyndugleikan yvir barninum, meðan dagliga umsorganin verður flutt til røktarfamiljuna fyri tíðarskeiðið, ið samdøgursrøktin varðar. Talan kann verða um styttri ella longri tíðarskeið, og einki ovara mark er fyri, hvussu longi tíðarskeiðið kann vara. Einki er til hindurs fyri, at samdøgursrøktin endar við, at søkt verður um ættleiðing, sí nærri undir "Samdøgursrøkt við atliti at ættleiðing".

*Nær krevst røktarloyvi*

Røktarloyvi krevst, um uppihaldið hjá røktarfamiljuni fer at vara longur enn 3 samfeldar mánaðir. Um tað frá byrjan av verður mett, at uppihaldið ikki fer at vara longur enn 3 samfeldar mánaðir, skal røktarloyvi fáast til vega so skjótt sum tað er greitt, at uppihaldið fer at vara longur enn 3 samfeldar mánaðir.

*Veitan av røktarloyvi*
Røktarloyvi verður einans givið, um mett verður, at uppihaldið er til gagns fyri barnið. Týdningarmesta atlitið er sostatt viðurskiftini hjá barninum, men talan er um eina broytiliga fortreyt, ið kann tulkast við støði í, hvussu leingi uppihaldið væntast at vara, aldurin á barninum og tilknýti annars til røktarfamiljuna.

Tá røktarloyvi skal veitast er neyðugt, at viðurskiftini hjá røktarfamiljuni verða kannaði nærri. Vavið av eini slíkari kanning er tó tengt at teimum ítøkiligu viðurskiftunum, herundir tilknýti hjá barninum til røktarfamiljuna og hvussu leingi uppihaldið væntast at vara.

Røktarloyvið verður givið av barnaverndartænastuni í kommununi, har røktarfamiljan býr.

Tað er foreldramyndugleikahavarin, ið hevur ábyrgdina av, at røktarfamiljan hevur neyðuga loyvið. Hetta kann elva til trupulleikar í teimum førum, tá foreldramyndugleikahavarin ikki kennir lógina, men trupult er at geva kunning hesum viðvíkjandi, tá talan er um eina privatrættarliga avtalu millum foreldramyndugleikahavaran og røktarfamiljuna. Tó ber altíð til hjá borgarum at venda sær til viðkomandi myndugleikar á økinum, og hava hesir skyldu at vegleiða viðkomandi um tær reglur, ið kunnu verða av týdningi, herundir omanfyrinevnda.

Loyvið skal altíð viðvíkja einum ávísum barni, og talan er tí ikki um eitt alment loyvi sum røktarfamilja. Tað er foreldramyndugleikahavarin, ið hevur ábyrgdina av at tryggja sær, at røktarfamiljan hevur neyðuga røktarloyvið. Hetta hevur við sær, at foreldramyndugleikin eisini hevur ábyrgdina av at boða kommununi, har røktarfamiljan býr, frá, um røktin varar longur enn 3 samfeldar mánaðir.

Talið av børnum, ið ein røktarfamilja kann fáa røktarloyvi til, er treytað av eini ítøkiligari meting. Talið av børnum, herundir um talan er um systkin, er tó av týdningi fyri metingina av, um uppihaldið er til gagns fyri einstaka barnið.

*Uppihald yvir longri tíð*
Um tað frá byrjan av er greitt, at barnið skal verða í samdøgursrøkt hjá røktarfamiljuni yvir longri tíð, skal røktarloyvi fyriliggja, áðrenn barnið flytur til røktarfamiljuna. Í slíkum førum, tá samdøgursrøktin varar yvir longri tíð, uppstendur ofta eitt kensluligt band millum barn og røktarfamilju, og serliga, tá talan er um smærri børn. Slík samdøgursrøkt kann harumframt ofta enda við, at søkt verður um ættleiðing. Tí er tað av stórum týdningi fyri barnið, at støða beinanvegin verður tikin til, um uppihaldið er barninum at gagni.

Kanningin av og avgerðin um, hvørt røktarloyvið kann gevast til samdøgursrøkt yvir longri tíð, eigur at byggja á somu viðurskifti sum, tá søkt verður um ættleiðing. Á henda hátt slepst undan, at ein samdøgursrøkt má steðga, tí tað seinni vísir seg, at ættleiðingarmyndugleikarnir ikki kunnu góðkenna røktarfamiljuna sum ættleiðingarforeldur.

Áðrenn røktarfamiljan verður góðkend at taka ímóti einum barni, skal kannast, um familjan hevur:

1) Reina revsiváttan. Hetta fyri at tryggja, at tey ikki fyrr eru revsaði fyri viðurskifti, ið kunnu verða til skaða fyri barnið.
2) Um neyðugt læknaváttan um heilsustøðu. Kravið má vera, at umsøkjararnir ikki hava rúsevnatrupulleikar ella álvarsligar sjúkur, sum kunnu ganga útyvir uppalingina hjá barninum.
3) Góðar bústaðarmøguleikar. Her krevst, at barnið fær eitt rúm fyri seg sjálvan at sova í, og at heimið annars er hóskandi til eitt barn.
4) At fíggjarligu viðurskiftini eru í lagi. Her kann barnaverndartænastan krevja at fáa innlit í fíggjarligu viðurskiftini hjá umsøkjaranum, so sum skattaupplýsingar og bankaupplýsingar.
5) Góðan førleika og møguligar royndir sum góðir uppalarar. Umsøkjarar hava góðan førleika at vera røktarfamilja, um tey hava neyðug innlivingarevni og umsorganarevni í mun til barnið. Tað verður ikki sett sum treyt, at umsøkjararnir hava royndir sum uppalarar, men hetta kann vera ein fyrimunur fyri barnið.

Afturat hesum kunnu nevnast upplýsingar um t.d. aldur, hjúnalagsstøðu og tal av børnum í heiminum. Samanumtikið skal barnaverndartænastan kanna tey viðurskifti, ið eru av týdningi fyri, um uppihaldið hjá røktarfamiljuni er til gagns fyri einstaka barnið.

*Samdøgursrøkt hjá skyldfólki*
Um barnið býr hjá nær skyldum ella øðrum næstringum, sum barnið frammanundan hevur eitt tætt tilknýti til, er tað so mikið sannlíkt, at uppihaldið er til gagns fyri barnið, at neyðugt tí ikki er við røktarloyvi og góðkenning í hesum førum. Hetta fyri ikki at gera seg ov nógv inn á serføroysku siðvenjuna við at t.d. ommur og abbar hava ommu- og abbabørn búgvandi frá tí, at hesi eru fødd ella sum heilt lítil og í roynd og veru hava yvirtikið dagligu umsorganina fyri barninum.

*Samdøgursrøkt við atliti at ættleiðing*
Neyðugt er við røktarloyvi til børn, ið verða tikin í privata samdøgursrøkt við atliti at ættleiðing, t.v.s har ættleiðingin er endamálið við samdøgursrøktini. Fyri at sleppa undan, at avvarðandi kommuna leggur seg út í viðgerðina hjá ættleiðingarmyndugleikunum av málinum um ættleiðing eigur røktarloyvið ikki at verða givið, fyrr enn umsøkjararnir eru góðkendir sum ættleiðingarforeldur til barnið, um so er, at ættleiðingin krevur eina tílíka góðkenning.

Verða umsøkjararnir góðkendir sum ættleiðingarforeldur til eitt ávíst barn, senda ættleiðingarmyndugleikarnir málið til kommununa, har umsøkjararnir búgva, ið síðani gevur røktarloyvi við atliti at ættleiðing. Í slíkum førum kann kommunan geva røktarloyvi við støði í teimum kanningum, ið ættleiðingarmyndugleikarnir hava gjørt í sambandi við góðkenningina sum ættleiðingarforeldur, uttan so, at serlig viðurskifti eru, ið gera, at neyðugt er við fleiri upplýsingum um umsøkjararnar. Í sambandi við eina umsókn um røktarloyvi við atliti at ættleiðing eigur kommunan í hvørjum einstøkum føri at meta um, hvørt neyðugt er við fleiri upplýsingum av týdningi fyri málið. Tað er síðani upp til ættleiðingarmyndugleikarnar at meta um, hvørt hesar upplýsingar elva til nærri umhugsan.

*Flutt verður til aðra kommunu*
Flytur røktarfamiljan til eina aðra kommunu, skal kommunan, ið flutt verður frá, gera nýggju kommununa varuga við røktarviðurskiftini. Kommunan, ið flutt verður til, tekur sjálv støðu til, um fyritreytirnar fyri røktarloyvinum framvegis eru til staðar.

*Tá privat samdøgursrøkt endar*

Privat samdøgursrøkt hevur sum fortreyt, at tað eru foreldrini sjálvi, ið hava tikið avgerð um at flyta barnið í privata familjurøkt. Útgangsstøðið er tí, at foreldrini eisini kunnu taka barnið heimaftur ella flyta barnið til aðra røktarfamilju. Tað er sostatt í útgangsstøðinum foreldramyndugleikahavarin, ið tekur avgerð um, nær og hvussu samdøgursrøktin endar.

*Tá barnið ikki kann flyta heim*
Um mett verður, at tað kann skaða barnið, kann barnaverndartænastan í kommununi, har foreldramyndugleikahavarin býr, eftir áheitan frá røktarfamiljuni ella barninum, gera tilmæli til Høvuðsbarnaverndarnevndina um, at barnið ikki skal flyta heim aftur frá privatari familjurøkt. Hugtakið "skaði" fevnir í hesum føri breitt, soleiðis at talan bæði kann verða um likamligan eins og sálarligan skaða.

Endamálið er at tryggja atlitið til barnið, sum kanska í longri tíð hevur búð í røktarfamiljuni. Um mett verður, at barnið kann taka skaða av at verða flutt heim, kann hetta verða noktað foreldramyndugleikahavaranum. Viðmerkjast skal, at talan ikki er um eina avgerð um umsorganaryvirtøku sambært § 19 í barnaverndarlógini. Tá mett verður, um barnið kann taka skaða av at verða flutt heimaftur, eru treytirnar linari enn tær, sum nevndar eru í § 19, stk. 2 í barnaverndarlógini. Sum omanfyri nevnt verður hugtakið skaði sambært lógaruppskotinum tulkað breitt og kann tað tí hugsast, at eitt nú kensluligt og annað tilknýti til røktarfamiljuna og umstøðurnar annars kann tala fyri, at barnið tekur skaða av at verða flutt heimaftur.

Longdin á uppihaldinum hjá barninum í røktarfamiljuni er av týdningi, tá mett verður, um barnið kann taka skaða av at verða flutt, og tí má metast, at vandin ikki er serliga stórur, tess styttri uppihaldið hevur vart.

Avgerðin um, at barnið ikki kann flyta heimaftur, verður tikin eftir áheitan frá røktarfamiljuni ella barninum sjálvum. Fær barnaverndartænastan eina slíka áheitan, skal málið leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan.

Avgerðin um, at barnið ikki kann flyta heim aftur, verður tikin av Høvuðsbarnaverndarnevndini. Mett verður, at ein avgerð um at nokta einum barni at flyta heimaftur er eitt somikið stórt inntriv í rættindini hjá bæði barni og foreldrum, og at talan er at líkna við eina umsorganaryvirtøku, soleiðis at rætti myndugleikin at taka hesa avgerð er Høvuðsbarnaverndarnevndin. Avgerðin verður tikin við støði í tilmæli frá barnaverndartænastuni, har foreldramyndugleikahavarin býr, og skal hetta tilmæli eisini fevna um eina hoyring av barnaverndartænastuni í kommununi, har røktarfamiljan býr.

Ongin freist verður sett um at taka málið uppaftur til nýggja viðgerð, tá talan framvegis er um privata familjurøkt. Barnið kann ikki sjálvt seta fram ynski um, hvar tað ynskir at búgva við tað, at avgerð einans verður tikin um, at barnið ikki kann flyta heim aftur frá røktarfamiljuni.

Verður avgerð tikin um, at barnið ikki kann flyta heimaftur frá privatari familjurøkt, og ynskja biologisku foreldrini ikki at leingja privatrættarligu avtaluna um privata samdøgursrøkt, eigur barnaverndartænastan at taka støðu til, um fyriskipanir sambært barnaverndarlógini skulu setast í verk, herundir um mælt eigur at verða til umsorganaryvirtøku av barninum.

*Biologisk foreldur, ið ikki hava foreldramyndugleika yvir barninum*
Neyðugt er ikki við røktarloyvi, tá barnið skal búgva hjá tí foreldrinum, ið ikki hevur foreldramyndugleika yvir barninum. Talan er í slíkum førum um aðra familjurættarliga lóggávu, ið regulerar økið, og skal henda ásetingin bert skiljast sum ein staðfesting av, at talan

ikki er um privata samdøgursrøkt, tá barnið býr hjá tí foreldrinum, ið ikki hevur foreldramyndugleikan.

**Til § 1, nr. 7**
Í sambandi við at barnaverndarlógin varð endurskoðað í 2012 varð heimildin at seta børn á stovn uttanlands flutt frá § 33, stk. 3 til § 35, stk. 2. Av misgávum varð henda broyting ikki gjørd í tilvísingini í § 69, stk. 1 í lógini. § 69, stk. 1 verður tí broytt samsvarandi.

**Til § 1, nr. 8**
Rætting av stavivillu.

**Til § 2**
Gildiskoma.

Almannamálaráðið, 27. februar 2017

Eyðgunn Samuelsen
**landsstýrismaður**

/ Eyðun Mohr Hansen

Fylgiskjøl:
1. Javntekstur
2. Kommunufelagið/Barnaverndarstovan
3. Sosialráðgevarafelag Føroya
4. Fosturforeldrafelagið
5. Føroya Kærustovnur
6. Almannaverkið